# Stuðulsfólk

Vegna ov fáar umsóknir lýsa vit av nýggjum eftir stuðulsfólki til 6 ára gamlan drong í Vágunum, at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiði hjá stuðlinum verður í heiminum og eftir skúlatíð hjá dronginum.
– At stimbra dronginum við spæli og venjingum, og annars vera við til og geva honum ein góðan og innihaldsríkan gerandisdag, einsamøllum og saman við øðrum.

Serligur dentur skal verða lagdur á málmenningina og samskifti við drongin. Stuðulin skal eisini kunna fara við honum til fysioterapi.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður hevur koyrikort.

Setunartíðin er fyribils til 30.06.02.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tlf. 314822, Ragnhild Dahl.

Umsóknir mugu verða okkum í hendi skjótast gjørligt, tó í seinasta lagi 10.09.01 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
att. Ragnhild Dahl
box 3096
110 Tórshavn

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til 13 ára gamlan drong í Vágunum, at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiði hjá stuðlinum verður at stimbra og menna drongin á allan hátt og annars vera við til at geva honum ein góðan og innihaldsríkan gerandisdag.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna og arbeitt verður eftir skúlatíð hjá dronginum.

Setunartíðin er fyribils til 30.06.02.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tlf. 314822, Ragnhild Dahl.

Umsóknir mugu verða okkum í hendi skjótast gjørligt, tó í seinasta lagi 10.09.01 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
att. Ragnhild Dahl
box 3096
110 Tórshavn

www.sosialurin.fo

Starv

# Maskinmeistari

Við hesum verður søkt eftir einum maskinmeistara til Strandfaraskip Landsins at seta í fast starv frá 1. november 2001.
Maskinmeistarin skal til eina og hvørja tíð kunna verða fluttur umborð á øll skip hjá Strandfaraskipum Landsins sum fyriskipað av leiðsluni.
Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein er settur umborð á.

**Uppgávurnar hjá skipunum**
Høvuðsuppgávurnar hjá skipunum eru at røkja innanoyggja fólka- og farmaflutning eftir fastlagdari ferðaætlan og annars aðrar túrar við ferðafólki runt oyggjarnar.

**Starvið fevnir um**
Maskinmeistarin skal vera við til at tryggja, at maskinaríið er í so góðum standi at øll, bæði manning og ferðafólk, kunnu kenna seg trygg, og annars at veita leiðsluni eina skilagóða rakstrarfyrisiting.
Maskinmeistarin skal eisini verða við til at tryggja, at allar formligar reglur á økinum verða fylgdar, og at arbeiðsgongdin er í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.
Aðrar høvuðsuppgávur hjá maskinmeistaranum eru m.a. at vera við til:
- Tryggja ein støðugan rakstur av skipinum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir- og ætlanir
- Hava eftirlit við maskinarínum
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

**Førleikakrøv**
- Vinnubræv sum skipsmaskinmeistari
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv - ikki eldri enn 2 ár
- Roykkavara-/sløkkileiðaraprógv - ikki eldri enn 5 ár
- Kunnleika og royndir viðvíkjandi rakstri av skipum (royndir sum yvirmaður)
- Kunnleika til lógarkrøv innanfyri rakstur av ferðamannskipum
- Góð samstarvsevnir og góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 14. september 2001, kl. 12.00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara, á tlf. 343000 ella e-post: pah@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Timburmaður

ella maður vanur við at smíða søkist.

Vit byrja aftur mánadagin 27. august.

KS TIMBURHÚS

E-post: kstimburhus@kstimburhus.fo
Tlf. 316187 · Fax 316784 · Fartlf. 216187

Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.
Sosialurin leggur seg eftir at bera
tíðindi úr øllum landinum.
Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota
bilinum við eyðkendu frámerkjunum.
Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið.
Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.
Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi
blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr.
42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:
edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo



Sosialurin

O2

**Elin Danielsen**
**Útb. fysioterapeutur**
Dr. Jakobsensgøta 22
100 Tórshavn
Tlf. 21 44 77

ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG
HITA · MASSAGU · LINNA

Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan



LEIÐARI TIL ELDING Í SMS • LEIÐARI TIL ELDING Í SMS



# Vit leita eftir tær!

Til Elding í SMS í Havn søkja vit eftir leiðara at byrja beinanvegin.

Elding er førandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert leiðarastarv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Somuleiðis bjóða vit góða løn og treytir, ið verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Vit vænta at tú ert ágrýtin, stinn/ur í leiðslu og dugnaligur í samstarvi við okkara viðskiftafólk og samstarvsfelagar.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 1. september 2001 og skal sendast til:

**Elding í SMS**
Postboks 1289
110 Tórshavn

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at seta seg í samband við Mads Andreas Winther, tel 21 62 30.

ELDING
SMS - Tel 319697

GEVIÐ BLÓÐ

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

TK Stovan

## Kunningarfundur:
CE-merking

**Mánadagin 3. sept. kl. 13.00-17.00 á Hotel Føroyum**

TK Stovan skipar fyri kunningarfundi um CE-merking á Hotel Føroyum, mánadagin 3. september, kl 13-17.

EU hevur í dag 21 direktiv um CE-merking. Nøkur av hesum eru heilt ella partvíst galdandi í Føroyum. Greitt verður frá hesum á fundinum. Nils Thyssen, sum í nógv ár hevur arbeitt sum CE-ráðgevi í Danmark, og sum eisini hevur undirvíst í hesum evni í Noregi, greiðir frá CE-direktivinum sum heild, men tó serliga frá:
- Maskindirektivinum
- EMC-direktivinum
- Lágpenningsdirektivinum
- Trýstberandi skipanum

1-2 føroysk virki greiða frá símum royndum við CE-merking.

Møguleiki er fyri at umrøða onnur CE-merkingsdirektiv enn hesi 4, um TK Stovan fær at vita um serligan áhuga frammanundan.

Endamálið við kunningarfundinum er at geva luttakarunum møguleika sjálvstøðugt at vera førar fyri at merkja og ansa eftir CE-merking av ávísum vørum/tólum. Kunningarfundurin viðger somuleiðis, hvørjar heimasíður kunnu verða góðar í slíkum arbeiði, og hvørja hjálp luttakarin kann fáa frá TK Stovuni, tá mannagongdin við eini CE-merking skal gjøgnumførast, og hvussu hetta kann ávirka mannagongdirnar á virkinum.

CE-merking kann verða framd eftir meginregluni:
- „Teknisk dokumentatión - Nær er hon nóg góð"?

Men samstundis vilja vit vísa á fyrimunirnar við einari væl fyriskipaðari og møguliga meira umfatandi mannagongd. Her verður hugsað um:
- Minni fyrisiting (td. at finna data/tekningar aftur)
- Betri brúkaravegleiðingar
- Hvørji eru krøvini?
- Stýring av veitarum og innkeyp
- Reglur fyri merking

CE-krøv kunnu eisini uppfatast sum ein víðari menning av kravfestingum fyri tað, sum eitt virki ger. Luttakararnir fáa eina tilfarsmappu á fundinum.

**Skrá fyri fundin:**
**Kl. 13:00** TK Stovan bjóðar vælkomin
**CE-merking**
**v/Nils Thyssen, ráðgeva:**
**Kl. 13:10** Hugtakið „trygd og heilsa" út frá direktivinum
**Kl. 13.30** Krøv til tekniska dokumentatión (skjalfesting)
Óljóðsviðurskifti (óljóð, sum hoyrist, og elektromagnetiskt órógv)
Stýring av veitarum og innkeypi
**Kl. 14.00** Krøv til brúkaravegleiðingar
**Kl. 14.30** Steðgur
**Kl. 14:50** Góðkenningarmannagongdir og samsvarsváttanir
**Kl. 15.50** Merkingarreglur annars
**Kl. 16.10** Um føroysk viðurskifti - hvat er galdandi?
**Kl. 16.20** Føroysk virki greiða frá dømum og loysnum í samband við CE-merking
**Kl. 16.50** Høvi at seta spurningar
Tikið verður saman um
**Kl. 17.00** Liðugt

**Tilmelding:** TK Stovan, fax nr. 31 93 63, tlf. nr. 31 73 66 ella teldupost tk@tk.fo

**Kostnaður:** kr. 400,00 u/mvg
Tilmelding í seinasta lagi **hósdagin tann 30. august kl. 12.00**
Tilmeldingin er bindandi.

Virkisnavn:______________________ Tal av luttakarum:__________

Navn/Nøvn:_______________________________________

_______________________________________

Tlf:______________________ Fax:______________________

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
**www**.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnulívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.

petur & petur • 320870